## Jon Dahl gjørdi bart

Danski áleyparin Jon Dahl Tomasson fekk júst tað byrjan, hann kundi ynskja sær, tá hann aftur var á liðnum hjá hollendska Feyernoord. Felagið spældi ein venjingardyst móti amatørliðnum Velo, og henda dystin vann Feyernoord heili 12-1. Jon Dahl Tomassen gjørdi fýra mál og legði upp til tvey. Danin byrjaði annars dystin á beinkinum, men kom á vøllin eftir steðgin og staðfesti, at hann framvegis veit hvar málið stendur.



## Eto'o umhugsar Usbekistan

Samuel Eto'o sigur seg av álvara hugsa um at skifta tilveruna í Barcelona út við fótbólt í Usbekistan. Kuruvchi eitur felagið, og teir hava gjørt greitt, at teir heldur enn fegnir síggja kvika áleyparan í teirra felag. Eto'o vitjaði eisini í høvuðsstaðnum í Usbekistan í gjár, har hann segði, at hann hevur fleiri tilboð í hondini. Hesi ætlar hann at hyggja at, eisini tað frá Kuruvchi, áðrenn hann tekur nakra endaliga avgerð.

# Súni sær møguleikan

**Hóast Brøndby framvegis er stórfavorittur, so heldur Súni Olsen møguleika vera fyri, at B36 kann spæla seg víðari í kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Besti maður á vølli. Tað var skoðsmálið, sum danska pressan gav Súna Olsen eftir síðsta bríkslið í Brøndby í gjárkvøldið. Harvið hevði landsliðsspælarin mint feløgini í superliguni á, at fyrrverandi AaB og Viborg spælarin framvegis er til!

- Vit eru hepnir at halda tætt, og tað ber við sær, at tað alla tíðina er intensitetur í. Tað var spell, at vit ikki skoraðu, tí so hevði tað verið heilt spennandi undan returuppgerðini.

Er møguleiki fyri at tit kunnu spæla tykkum víðari í kappingini?

- Teir eru framvegis favorittar, men vit fara at stríðast fyri sensatiónini. Hon lúrir onkra staðni, men hon gerst bara til veruleika, um vit geva okkum fullkomuliga, og um vit hava alt hepni á okkara síðu, samstundis sum teir eru óhepnir. Men tað er møguleiki fyri tí, helt Súni Olsen.



*Súni Olsen var av mongum mettur at vera besti maðurin á vøllinum í gjár*

*Mynd: Polfoto*

# Køhlert var rísin

**Brøndby venjarin sigur seg ikki kvíga fyri, at hansara lið fer at dumpa á graslíkinum í Gundadali**

*FÓTBÓLTUR*
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Brøndby venjarin Tom Køhlert var ikki nøgdur við tað, sum hann hevði verið eygnavitni til á Brøndby stadion. Men kortini segði hann seg ikki kvíga fyri, at tað ikki skal eydnast hansara monnum samantalt at vinna á B36 og harvið at spæla seg víðari í kappingini.

- Dysturin verður á graslíki, men tað er ikki heilt fremmant fyri okkum. Donsku feløgini hava graslíkisvallir, sum vit ein part av árinum venja á. Undan ferðini til Føroya fara vit at venja 2-3 ferðir á graslíki. Meiri er ikki í tí enn tað, staðfesti Brøndby venjarin, sum ikki var nøgdur við avrikið hjá sínum monnum.

- Boðini vóru at spæla skjótt, at trýsta teir langt frammi á vøllinum og at vera neyvir í royndunum ímóti málinum. Tað er skjótt at staðfesta, at einki av hesum eydnaðist, sum ætlanin var, at tað skuldi gera, og tí varð úrslitið soleiðis, sum tað varð. Vit høvdu møguleikar at skora fýra mál, og eg kvígi ikki fyri, at vit ikki fara at spæla okkum víðari í kappingini, var viðmerkingin hjá Brøndby venjaranum, sum var væl nøgdur við, at tað ikki hevði eydnast B36 at fáa mál.



*Vit høvdu møguleikar at skora fýra mál, og eg kvígi ikki fyri, at vit ikki fara at spæla okkum víðari í kappingini, sigur Tom Køhlert, venjari hjá Brøndby*

*Mynd: Polfoto*



*Oddmar Færø stóð seg væl í miðverjuni. Her sæst hann í dysti við nýggja leikaran í Brøndby, Alexander Farnerud*

*Mynd: Polfoto*

## Brøndby IF-B36 1-0 (0-0)

UEFA Cup fyrri dystur í 1. innleiðandi umfari Hósdagin 17. juli kl. 20.05 á Brøndby stadion í Brøndby

**Dómarakvartett av Malta:** Christopher Lautier, Philip Agius, Edward Spiteri og Clayton Pisani

**UEFA eygleiðari úr Wales:** David George Collins

**UEFA dómara eygleiðari úr Pólandi:** Eugeniusz Kolator

**1-0:** Max von Schlebrügge 50.

**Brøndby:** 16. Stephan Andersen – 29. Daniel Wass, 3. Max von Schlebrügge, 15. Jon Jönsson, 21. Thomas Rasmussen – 17. Tobias Mikkelsen, (13. Peter Madsen, 62.), 20. Stefan Gislason, 6. Samuel Holmén, 7. Kasper Lorentzen (14. David Williams, 72.) – 11. Morten 'Duncan' Rasmussen, (12. Chris Katongo, 43.), 9. Alexander Farnerud
**Gult kort:** eingin
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 1. Michael Tørnes, 25. Jacob Berhelsen, 34. Pierre Kanstrup
**Venjari:** Tom Køhlert

**B36**: 1. Meinhard Joensen – 18. Magnus Olsen, 5. Oddmar Færø, 4. Dmitrije Jankovic, 2. Alexandre Dos Santos – 7. Bergur Midjord, Klæmint Matras, 14. Jóhan V. Gunnarsson, 10. Súni Olsen, 6. Hanus Thorleifsson – 23. Sam Malsom (12. Johan Ellingsgaard, 90.)
**Gult kort:** Dmitrije Jankovic 11., Alexandre Dos Santos 64., Bergur Midjord 84.
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 1. Hans Jørgensen, 17. Bogi Hermansen, 19. Rúnar í Lon Jacobsen, 24. Ásbjørn V. Gunnarsson.
**Venjari:** Heðin Askham